# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Audiologiassistentur til Hoyriklinikkina

Eitt fast heiltíðarstarv sum audiologiassistentur verður við hesum lýst leyst at søkja til setan 1. juli 2007 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv**

- prógv sum audiologiassistentur
- tænastusinni
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Bjarka Ellefsen, yvirlækna, lokal 5367 ella til Juttu Helgadóttir, audiologiassistent á telefon 322103.

**Umsóknarfreistin** er 31. mai 2007 kl. 12.00

## Fysioterapeutar (endurlýsing)

Søkt verður eftir 2 avloysarum til Fysioterapideildina, fulla tíð, frá 1. august 2007 til og við 31. desember 2007 og frá 1. august 2007 til og við 31. juli 2008.

**Fysioterapeutiska arbeiðið er at**

- leggja til rættis, gjøgnumføra og samanhangandi eftirmeta málrættaða viðgerð- og rehabiliteringsupplegg í samstarvi við brúkara, avvarðandi og onnur starvsfólk.
- kunna og vegleiða sjúklingin við tí endamáli, at økja um hansara egna fysiska-, psykiska- og sosiala tilfeingi. Hetta at fremja nýtsluna og menningina av tilfeinginum og at afturvinna ella betra um funktiónsevni, førleikamøguleika og lívsvirðið.
- seta í verk tiltøk og hættir, sum ávirka kroppsligu støðuna hjá sjúklinginum, og á hendan hátt betra um psykisk/mentalu heilsustøðuna og sosiala virkisevnið.

Málbólkurin er sjúklingar, innlagdir á Landssjúkrahúsinum og vegleiðing av sjúklingum, sum koma ambulant. Vit søkja eftir einum fysioterapeuti við áhuga í at arbeiða á sjúkrahúsi. Vænta ágrýtni, góð samstarvsevni, opinleika og neyvt samarbeiði við starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum. Vit starvast sum yvir- og deildarfysioterapeutur, fysioterapeutar og sjúkrahjálpari, í alt 14 fólk.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Karin Djurhuus, virkandi yvirfysioterapeut, lokal 5790.

**Umsóknarfreistin** er 28. juni 2007 kl 12.00

## Reingerðarfólk

Til Reingerðardeildina verður søkt eftir 3 reingerðarfólkum til setan skjótast gjørligt, tvey sum føst størv og eitt sum frítíðaravloysarastarv.

Talan er bæði um manuella reingerð og reingerð við maskinu, m.a. í tunlinum.

Á Reingerðardeildini við 60 fólkum í arbeiði er ein dámligur og óhátíðarligur samverutóni, og tú fært eina góða innleiðslu.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Alvildu Samuelsen, deildarleiðara, lokal 1243, har tað eisini ber til at tosa um arbeiðstíðina og starvsbrøkin.

Ert tú jalig/ur, samstarvshugað/ur, opin fyri menning og broytingum, og hetta er nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn áðrenn 25. mai 2007 kl. 12.00

## Onnur Størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Starvsfólk til Kaféina**
Umsóknarfreistin er 14. mai 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G1**
Umsóknarfreistin er 18. mai 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til A2**
Umsóknarfreistin er 18. mai 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar/pleygarar til Psyk. D4/5**
Umsóknarfreistin er 18. mai 2007 kl. 12.00

**Yvirlækni í onkologi á Med.**
Umsóknarfreistin er 21. mai 2007

**Yvirlækni í neurologi á Med.**
Umsóknarfreistin er 21. mai 2007

**Ljósmóðir til Ljósmøðratænastuna**
Umsóknarfreistin er 24. mai 2007 kl. 12.00

**Leiðandi ljósmóðir (endurlýsing)**
Umsóknarfreistin er 24. mai 2007 kl. 12.00

**Introduktiónstarv í intern med.**
Umsóknarfreistin er 15. juni 2007

**Introduktiónstarv í almen kirurgi**
Umsóknarfreistin er 16. juli 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

---

# FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

---

# STARVSFÓLK TIL STATOIL ARGIR

Statoil Argir sóknast eftir dugnaligum starvsfólki til at arbeiða skiftandi vaktir. Uppgávurnar eru: Kassin og annað vanligt handils arbeiði.

Statoil Argir leggur stóran dent á at veita góða tænastu.

Ert tú fyrikomandi, smílandi, og eldri enn 17 ár? So er tað kanska júst tær vit leita eftir.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Róa Snorrason á tlf. 56 40 16.

Ljóðar hettar sum tú? Send so eina skrivliga umsókn til:

**Statoil Argir**
Traðargøta 41
FO-160 Argir

STATOIL

---

mbf

## Aðalfundurin 2007-05-10

Sum fyrr fráboðað verður aðalfundurin hjá MBF **Týsdagin 15. mai kl. 19.00** í MBF húsinum

Aðalfundarskráin verður smb. lógum felagsins

Áðrenn sjálvan aðalfundin heldur Róland í Skorini fyrilestur um:

**"Gengransking og etikkur".**

*Møtið fjølment.*

**Starvsnevndin**